## *5 teir bestu ferðabýirnir*

*Vit hava biðið Mariu Samson Lamhauge, sum starvast hjá Flogfelag Føroya, valt teir fimm bestu býirnar ferðast til.*



# París – býurin yvir allar aðrar

Tað verður mangan tikið til, at París er býur býanna, og í hesum býnum ført hug at halda tínum kæra ella kæru í hondini. Býurin er sera romantiskur og intimur, og eingin býur í Europa er sum franski høvuðsstaðurin.

París verður ofta settur í samband við móta, og París fer sjálvur ongantíð av móta. París er sjarmerandi, vinarligur og spennandi býur at ferðast til. Møguleikarnir fyri at uppliva mentan, býarlív ella annað eru óteljandi, og tær mongu mentaninar úr øllum heiminum, sum hittast í París, gera býin til nakað heilt fyri seg. Farin stórtíð verður blandað saman við eina pulserandi nútíð, og tað ger París til ein bý, sum er verdur eina vitjan, nær tað skal verða.






















